Kappingarráðið

**Advokatskrivstovan**
Frúutrøð 4
Postboks 6
FO-110 Tórshavn

Att: Christian F. Andreasen

Tórshavn, tann 19. desember 2008

J.nr.: K600-2008063
Viðgjørt: S.R
Tygara ref:

**Viðvíkjandi: P/f Tryggingarfelag Føroyar yvitekur virkisøkið frá P/f Trygd**

Tryggingarfelagið P/f Trygd hevur seinast í november 2008 av givnum orsøkum avgjørt at niðurleggja tann partin av tryggingarvirkseminum, sum fevnir um tryggingar av vinnuliga riknum skipum.

Talan er um umleið 80 tryggingarskjøl, sum eru teknað við gildi fram til 31. desember 2008. Sostatt er skotbráið hjá felagnum at fráboða hesa avgerð ógvuliga stutt.

Kappingarráðið er kunnað um og hevur tikið til eftirtektar grundgevingarnar hjá P/f Trygd fyri at taka hesa avgerð.

Av tí at hetta setir viðkomandi tryggingartakarar hjá P/f Trygd í eina óhepna støðu, tí at teir við so stuttari freist skulu finna annað tryggingarfelag, hevur P/f Trygd valt at gera ein avtalu við Tryggingarfelag Føroyar (TF), har TF bjóðar teimum 80 tryggingartakarunum eina trygging, um áhugi er fyri tí.

Christian Andreasen, adv. setti, tann 9. desember 2008, fram fyrispurning til Kappingareftirlitið, um avtalan millum Trygd og TF var fevnd av Kappingarlógini. Tann 12. desember 2008 høvdu Kappingareftirlitið og umboð fyri Trygd fund. Á hesum fundi boðaði Kappingareftirlitið frá at avtalan var fevnd av §13 í Kappingarlógini.

Talan er um eina yvirtøku av virkisøki, sum er fevnt av Kappingarlógini §13, stk. 1, nr. 1. Tvær av luttakandi fyritøkunum hava ein umsetning omanfyri 4 mió. kr., og samlaði umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum er omanfyri 75 mió. kr. Tí skal yvirtøkan viðgerast eftir §15 í Kappingarlógini, sambært Kappingarlógini §14, stk. 2, nr. 3.

Sambært §15 skal Kappingarráðið kannað, um yvirtøkan forðar fyri virknari kapping, tí ein marknaðarráðandi støðu verður skapt ella styrkt.

Ein marknaðarráðandi støðu verður ikki skapt ella styrkt, um:

1. útlit eru til at fyritøkan, sum verður yvirtikin innan styttri tíðarskeið, verður tvungin út av marknaðinum, um fyritøkan ikki verður yvirtikin,
2. marknaðarparturin hjá fyritøkuni fer til fyritøkuna, sum tekur yvir,
3. einki alternativ er til yvirtøkuna, sum virkar minni kappingaravmarkandi.



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

**Avgerð**
**Kappingarráðið hevur tann 16. desember 2008 avgjørt at góðkenna avtaluna, men við heimild í Kappingarlógini §15, stk. 2 er góðkenningin treytað av:**

1. **at P/f Trygd sendir nýtt bræv til teir kundar, ið eru nevndir í fylgiskjali 1 til avtalu frá 4. desember 2008, nevnd "Avtala millum P/f Trygd og P/f Tryggingarfelag Føroyar (TF)" .**
2. **at á fyrstu síðu á brævinum, skal greitt tilskilast fylgjandi:**

   **"Hesar fyritøkur kunnu veita tryggingar til skip**

| | |
|---|---|
| **Tryggingarfelagið Føroyar P/F** | **Tryggingamiðstøðin hf.** |
| **Kongabrúgvin** | **C/o Sp/f Íti** |
| **Postsmoga 329** | **Gongin 10** |
| **FO-110 Tórshavn** | **FO-100 Tórshavn** |
| **tel. +298 345600** | **Tel. +298 28 81 82** |
| **tf@trygging.fo** | **ace@amac.fo"** |

**Kappingarráðið metir, at tá ið skotbráið er so stutt, eigur P/f Trygd í seinasta lagi tann 22. desember 2008 kl. 12.00 at svara, um P/f Trygd góðtekur treytirnar. Somuleiðis eigur P/f Trygd at senda avrit av nýggja brævinum til Kappingareftirlitið til kunningar í seinasta lagi tann 22. desember 2008 kl. 12.00.**

**Málslýsing**
Tann 4. desember 2008 varð avtala gjørd millum P/f Trygd og TF, har TF skal geva teimum 80 skipunum tilboð um at tekna sjóvátryggingar. Sum samsýning skuldi TF gjalda xxxx til P/f Trygd. Gjaldið var fyri, at P/f Trygd varðveitti ábyrgdina av at endurrinda fyri skaðar, sum stava frá tíðarskeiðinum áðrenn 1. januar 2009.

Tann 9. desember 2008 vendir Christian Andreasen, adv., sær til Kappingareftirlitið fyri at fáa greiðu á, um avtalan var fevnd av ásetingunum í Kappingarlógini. Av tí at skotbráið var sera stutt, valdi Kappingareftirlitið at halda fund við P/f Trygd, heldur enn at biðja um formliga fráboðan. Á fundinum, ið var hildin tann 12. desember 2008 kl. 10.00, kom fram at P/f Trygd hevði upplýst TF hvørjar kundar talan var um og sostatt var avtalan partvíst framd.

Á fundinum staðfesti Kappingareftirlitið, at talan var ikki um eina avtalu sambært Kappingarlógini § 6, men um eina yvirtøku fevnd av Kappingarlógini §13. Kappingareftirlitið var samt við umboðunum hjá P/f Trygd um, at skilligt var, at P/f Trygd mátti gevast við hesum virksemi, men at tað var av stórum týdningi, at kundarnir ikki vóru sleptir uppá fjall. Tískil komu partarnir ásamt um, at ein skrivlig fráboðan var óneyðug og reint tíðarspilla í hesum føri. Tað var onki ivamál um, at yvirtøkan var skaðilig fyri Kappingina, men hon kundi ikki umgangast. Sostatt avgjørdi Kappingareftirlitið, at ikki var neyðugt hjá P/f Trygd við fullari fráboðan, tí ein møgulig góðkenning ikki kann koma av, at ráðandi støða ikki styrkist, men orsakað av at óansæð hvat hendur, verður endin at ein marknaðarráðandi støða styrkist. Kappingareftirlitið góðtók sostatt, at tey skjøl, sum Kappingareftirlitið longu hevði fingið frá Christian Andreasen, adv., og teir upplýsingar, ið vóru givnir á fundi tann 12. desember 2008, vóru nøktandi til, at málið kundi leggjast fyri Kappingarráðið.



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

Seinnapart tann 12. desember 2008 almannakunngjørdi Tryggingareftirlitið, at nýtt tryggingarfelag var komið á marknaðin. Talan var um íslendsku Tryggingarmiðstøðina Hf. Sostatt var nú nýggj støða íkomin, ið gjørdi, at avtalan frá 12. desember 2008 møguliga ikki var einasta loysn.

Tann 18 desember sendi Kappingarráðið út eitt hoyringsskriv til fráboðara, har greitt var frá hvussu Kappingarráðið ætlaði at málið skuldi loysast.

Á fundi sum var hildin tann 19. desember 2008, sambært kunngerð nr. 8 frá 13. mars 2008 §10[1], hava umboð fyri fráboðaran, Christian Andreasen, adv. og Jean Djurhuus, stjóri, greitt frá teirra sjónarmiðum.

Á eftirfylgjandi fundi tók Kappingarráðið avgerð í málinum.

**Kappingarráðsins meting**

Kappingarráðið hevur tikið frágreiðingina hjá fráboðaranum til eftirtektar, at tað ikki er gjørligt hjá P/f Trygd at halda fram við sínum virksemi eftir 1. januar 2009.

Kappingarráðið er komið til ta niðurstøðu, at talan er um avtalu, ið er fevnd av Kappingarlógini §13, stk. 1, nr. 1.

Endamálið við Kappingarlógini[2] er at tillaga føroysku kappingarreglurnar til ES kappingarlógar-verkið. Danska Konkurrenceloven[3] var í stóran mun grundarlag undir føroyska lógaruppskotinum, ið var lagt fram og samtykt av Føroya Løgtingi tann 27. apríl 2007[4].

Verður hugt at §13, stk. 1, nr. 1 í føroysku Kappingarlógini og í donsku Konkurrenceloven §12a, stk. 1, nr. 2, framgongur, at hesar eru samlíkar. Danska ásetingin stavar frá Rfo 4064/89, sum nú er skiftir út við Rfo 139/2004[5]. Í 2008 gav ES Kommissiónin út vegleiðing[6] um hvussu ymisk hugtøk í Rfo 139/2004 skuldu skiljast. Vegleiðingin var ein samanskriving av eldri vegleiðingum og royndum sum ES Kommissiónin hevði gjørt seinastu árini.

Kappingarráðið metir, at tað er í lógarinnar anda, at umsitingin av lógini liggur so tætt at ES reglum og ES siðvenju sum gjørligt.

Í fyrrnevndu vegleiðing[7] verða hugtøkini í Rfo 139/2004 allýst. Í litra 24 verður m.a. lýst nærri:

> ”1.3. Kontrollens genstand
>
> (24) Ifølge fusionsforordningens artikel 3, stk. 1, litra b), og stk. 2, kan genstanden for kontrollen være en eller flere virksomheder **samt også dele af virksomheder, der udgør retlige enheder, eller sådanne enheders aktiver eller blot nogle af aktiverne. Når der erhverves kontrol over aktiver, anses der kun at foreligge en fusion, hvis disse aktiver udgør en virksomhed som helhed eller en del af den, altså et forretningsområde, der har et marked med en klart påviselig markedsomsætning [29]. En overdragelse af en virksomheds kundegrundlag kan opfylde disse kriterier, hvis det er tilstrækkeligt til, at der sker en overdragelse af en virksomhed med en markedsomsætning [30].** En

[1] Kunngerð nr. 8 frá 13. mars 2008 um starvs- og fundarskipan fyri Kappingarráðið, sum broytt við kunngerð nr. 15 frá 30 apríl 2008

[2] Løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping, sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008

[3] LBK nr. 785 af 8. august 2005

[4] Hetta framgongur av viðmerkingunum til lógaruppskotið í parti 1a.

[5] EST L 24 frá 29.1.2003

[6] EST C 95/1 frá 16.4.2008

[7] EST C 95/01 frá 16.4.2008



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

transaktion, der udelukkende omfatter immaterielle aktiver såsom varemærker, patenter eller copyrights, vil også kunne blive betragtet som en fusion, hvis disse aktiver udgør et forretningsområde. Under alle omstændigheder vil en overdragelse af licenser på varemærker, patenter eller copyrights uden overførsel af yderligere aktiver kun opfylde disse kriterier, hvis licenserne er eksklusive i hvert fald på nogle områder, og den omsætningsskabende aktivitet overføres sammen med licenserne [31]. Ikke-eksklusive licenser kan aldrig i sig selv udgøre en virksomhed, hvortil der er knyttet en markedsomsætning."

Sambært vegleiðing frá Kommissiónini kann ein yvirtøka av eini kundaportefølju koma undir samanleggingar hugtakið, um talan er um virksemið, ið hevur ein umsetning. Í avgerð hjá Kommissiónini frá 2002 vóru stórir ravmagnskundar, ið ikki vóru heftir at nøkrum kunda, mettir at verða eitt handla aktiv, sum var fevnd av samanleggingar hugtakinum[8].

Innan tryggingarvirksemið hevur danska Konkurrencerådet viðgjørt mál, har talan var um yvirtøku av kundum[9]. Í 2002 góðkendi danska Kappingarráðið at Tryg Forsikring A/S yvirtók vanlukkutryggingarkundarnir hjá Zürich Versicherungsgesellschaft[10].

Danska Kappingarráðið segði í síni avgerð at:

> "**at** Tryg Forsikrings overtagelse af Zürichs aktiviteter her i landet udgør en fusion omfattet af konkurrenceloven, jf. § 12 a. stk. 1, nr. 2"

Sum áður nevnt eru §13, stk. 1, nr. 1 í føroysku Kappingarlógini og § 12 a. stk. 1, nr. 2 og donsku Konkurrenceloven samlíkar.

Kappingareftirlitið metir tí, at talan er um yvirtøku av parti av eini fyritøku, sambært §13, stk. 1, nr. 1,. og at henda yvirtøka er fevnd av fráboðanarskylduni í §14, stk. 1.

## Árin á Kappingina

Kappingarráðið metir, at henda yvirtøka vil hava við sær at eitt monopol verður skapt á marknaðinum fyri sjóvátryggingar. Sum meginregla er ikki grundarlag fyri at góðkenna eina yvirtøku, um hon viðførur at virkna kappingin á marknaðinum verður forðað, tí ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkt. Í so máta er ein monopol støða ótolandi.

Hinvegin framgongur tað av lógarviðmerkingunum til Kappingarlógina §15, stk. 1, at um niðurstøð-an er, at ein yvirtøka hevur neiliga ávirkan á kappingina, kann hon góðkennast, um so er:

1) at útlit eru til at fyritøkan, sum verður yvirtikin innan styttri tíðarskeið, verður tvungin út av marknaðinum, um fyritøkan ikki verður yvirtikin,
2) at marknaðarparturin hjá fyritøkuni fer til fyritøkuna, sum tekur yvir og
3) at einki alternativ er til yvirtøkuna, sum virkar minni kappingaravmarkandi

Grundgeving fyri at loyva yvirtøku undir slíkum umstøðum er, at líka mikið um yvirtøkan fer fram ella ikki, vil tann óynskta marknaðarstøðan gerast veruleiki innan heilt stutta tíð.

Fram til fríggjadagin tann 12. desember 2008, var onki annað alternativ til hesa avtalu enn TF. Eftir hetta er nýtt felag komið á marknaðin.

---

[8] COMP/M.2857 – ESC/IEH nr. 9
[9] Udskillelsen af skadesforsikringsaktiviteterne i Nordea til Tryg – fra Rådsmødet den 25. september 2002
[10] Tryg Forsikrings køb af Zürich Forsikrings skadesforsikringsportefølje – fra Rådsmødet den 19. juni 2002



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

Kappingarráðið metir, at frá fríggjadegnum tann 12 desember 2008, leyk avtalan ikki treytirnar 1-3, við tað at eitt alternativ til yvirtøkuna kom henda dagin. Kappingarráðið metir tó, at um avtalan ikki verður góðkend, er stórur vandi fyri, at avleiðingin fyri kappingina vildi verið hin sama, sum um onki alternativ var til hesa yvirtøku. Orsøkin til hetta er, at skotbráið er stutt, og avtalan er partvíst framd.

Kappingarráðið avgjørdi tí, at góðkenna avtaluna treyta av, at P/f Trygd beinanvegin sendir bræv til viðkomandi kundar og kunnar teir um, at tvey tryggingarfeløg eru.

Við hesum metir Kappingarráðið, at skaðaárinini av, at avtalan er partvíst framd, verður avmarkað.

**Niðurstøða**
Kappingarráðið metir, at avtalan sum Trygd og TF hava undirskrivað tann 4. desember 2008, er ein partvís yvirtøka og er sostatt fevnd av Kappingarlógini §13.
Kappingarráðið metir, at avtalan um yvirtøku eigur at verða góðkend, undir teimum treytum at P/f Trygd sendir viðkomandi kundum bræv við ávísing um hvørji tryggingarfeløg eru á føroyska marknaðinum.

**Kæruvegleiðing**
Henda avgerð kann innan 4 vikur eftir móttøku av hesum skrivi kærast til Vinnukærunevndina, co Føroya Kærustovnur, Undir Hornabakka, postsmoga 45, FO-110 Tórshavn.

Vegna Kappingareftirlitið

Ingunn Ó. Eiriksdóttir
formaður

/Terje Sigurðsson
deildarstjóri



Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo